# - Ynskja ikki nakran

**Tað tekur sína tíð at koyra teir níggju kilometrarnar av smølum landsvegi av Strondum og norður á Selatrað. - Nei, tað er ikki altíð líka stuttligt at koyra eftir Selatraðarvegnum. Høvdu vit bara fingið ein beinari og breiðari veg, sigur Sanna Andreasen, bygdaráðslimur á Selatrað**

BYGDAMENNING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*



**Selatrað:** Tað er langt millum bilarnar, sum koyra eftir vegnum til Selatraðar.

Tey sum koyra eftir vegnum á fyrsta sinni, munnu undrast um, at hann er so vánaligur sum hann nú einaferð er. Tað er sum at vera umborð á báti í ringum sjógvi.

Umframt hetta er vegurin smalur, og kemur tað fyri, at ein bilur kemur tvørt fyri ella skeivur á vegnum, so kann meiri enn so henda, at hann fer út av vegnum, og tá er ikki nógv at gera.

Ynskið hjá fólki á Selatrað er at okkurt verður gjørt við vegastrekkið, soleiðis at tað fer at hóska til nútíðina. Ein teirra er Sanna Andreasen, sum umboðar Selatrað í bygdaráðnum á Strondum.

- Vit ynskja og vóna skjótt at fáa ein breiðan og ikki minst beinan veg til Strendur. Vit ynskja kortini ikki ein motorveg, men bert ein ein breiðari veg, sigur hon í hesi samrøðuni við Sosialin.

Tað eru umleið 60 ár síðani at vegurin kom til Selatraðar, men nú er tað alt fleiri og fleiri sum ynskja, at vegastrekkið út á Strendur verður dagført til nútíðina.

Í einum komandi blaði fara vit at umrøða avleiðingarnar, sum vegasambandi hevur havt fyri bygdina. Seinastu 3-4 árini er fólkatalið minkað úr 62 niður í 52!

## Spurningur uttan svar

Ein avgerandi treyt fyri at einhvør bygd ella býur kann menna seg ella hava framburð, er gott vegasamband við meginøkið.

Her hevur Selatrað tann fyrimun, at vegurin kom longu til bygdina fyri umleið 60 árum síðani. Hetta var fólkinum tá til stórt gagn og gleði, ikki minst ta tíðina, tá Sundaferjan sigldi millum Selatrað og Hósvík.

Í dag kann ein siga, at fólkið anno 2010 krevur góðar vegir, breiðar vegir og ikki minst tryggar vegir. Og her er tað, at tað kanska haltar mest við tí umleið níggju kilometrar langa vegastrekkinum til Morskranes, Kolbanagjógv og Strendur:

Selatraðarvegurin er snøgt sagt ikki hóskandi til ferðsluna og ferðingarmynstrið í dag!

*Her koma mangan stórir bussar við ferðafólkum, eins og fólk við jøvnum millumbilum vitja skótadepilin í bygdini. Nú ætlanin er at víðka um virksemið her, er eingin ivi um at ferðslan bara fer at økjast enn meiri í framtíðini*

Hetta vita fólk á Selatrað alt um. Og hetta hevur Sanna Andreasen eisini sína meining um, tá hon verður spurd um tað sama. Hon svarar í roynd og veru við einum mótspurningi:

- Hví spyrt tú ikki onkran sum ikki býr her og sum sjáldan koyrir hendavegin?

- Øll hesi fólkini kunnu geva tær besta svarið uppá spurningin!, sigur Sanna avgjørd.

## Lívsfarligt

Sanna hevur búð í meiri enn 30 ár á Selatrað – hon er upprunaliga av Skipanesi – og arbeiðir á Strondum.

Hon veit tí alt um, hvat tað merkir at koyra eftir vegastrekkinum bæði í góðum og ringum líkindum. Tað er helst so sum hon sigur:

- Eg koyri eftir vegnum hvønn einasta dag. So eg hugsi als ikki um, hvussu vegurin er.

- Men tey, sum ikki búgva her, - tey siga í øllum førum, at hann er lívsfarligur, slær Sanna fast.

*Tá tað fer at nærkast ársenda, verður tøkur peningur so at siga bert tveittur í Selatraðarvegin*

Sum bygdaráðslimur í Sjóvar kommunu er hon sjálvandi áhugað í tí, sum rørir seg millum fólkið. Og tá talan er um vegastrekkið millum Selatrað og Strendur eru fólk rættiliga samd á máli:

Vegastrekkið er bæði smalt, tað er veikt, sýnirnar eru nógvar, vegurin skrædnar í støðum og haraftrat hellir hann.

## Eingin olja – nógv rusk

Fyri tann fremmanda kann ein túrur eftir Selatraðarvegnum vera ein góð og vøkur uppliving. Men á vetrartíð er tað alt annað enn stuttligt at koyra her.

Tað er meiri enn so